# ítróttur

Nr. 2 • týsdagur • 3. januar 2006 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Stjørnan endar í Vági

**Endaspælið í Sunset-kappingini er nú lagt til rættis. Her hava teir fýra FM-biðlarnir seks dystir at prógva, at júst tær skulu vera partur av dystunum, sum fara at avgera, hvar føroyameistaraheitið í kvinnuhondbólti skal enda í ár**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*

Hondbóltssambandið hevur nú boðað frá, hvussu spælt verður í endaspælinum í Sunset-kappingini.

Her eru liðini í FM-endaspælinum Stjørnan, VB, Neistin og Kyndil. Og stendur tað til kappingarnevndina, so verða tað helst Stjørnan og VB, sum fara at stríðast um tey bæði fremstu plássini. Eisini hóast Neistin í grundspælinum hevði hug at kílað seg ímillum hesi.

Men hvussu víkir og vendir, so bendir alt á, at Stjørnan er stórfavorittur til gullilð. Í grundspælinum taptu tær bert ta einu ferðina - móti Kyndli - men við sigrum á bæði Neistanum og VB staðfestu klaksvíkskvinnurnar, at tær higartil hava verið sterkasta liðið í kappingini.



*Talan kann væl gerast um sannan gysara, tá Stjørnan í seinasta dystinum í FM-endaspælinum skal á vitjan hjá VB*

## Neistin til próvtøku

Hvørt Neistakvinnurnar aftur í endaspælinum megna at seta kílar í í so máta, fæst kanska eisini ein ábending um longu fyrsta umfarið. Tá skal Neistin nevniliga á vitjan í Klaksvík, og í næsta umfarinum er tað so VB, sum kemur á vitjan í Havn.

Við byrjan í FM-endaspælinum hevur einki av liðunum nakað stig við sær, og tí fara fyrstu tvey umførini allar helst at geva eina sterka ábending um, hvørji lið verða partur av finaludystunum, sum skulu avgera kappingarárið.

Hóast Kyndil hevur víst, at tær hava evni at arga tey ovaru, so er lítil ivi um, at tær grønu allar helst verða við skerdan lut í endaspælinum. Men bara við at røkka hesum er einki at ivast í, at fyrsta málið í kappingarárinum er rokkið hjá teimum grønu.

## Botnstríðið

Meðan tey fýra ovaru liðini stríðast fyri FM-møguleikanum, so er tað niðurflytingarvandin, sum stendur fremstur í huga hjá niðaru liðunum.

Her tykist VÍF at hava sterkasta liðið, men tað er so nakað, sum skal standa sína roynd seinastu seks dystirnar hjá liðnum. Tí hvørki StÍF, Søljan ella Tjaldur munnu fara at lata nakað frá sær við góðum seinastu dystirnar. Tjaldur hevur enn ikki vunnið sær nakað stig í ár, men við styrkinum, sum liðið fekk í grundspælinum, eru fortreytirnar fyri framburði í øllum førum til staðar.

Søljan og StÍF hava fyrst og fremst satsað upp á egið fólk í ár, og so er spurningurin, hvørt hetta fer at røkka hjá teimum báðum. Her er væl hugsandi, at seinasti dysturin hjá teimum báðum liðunum fer at vísa seg sum avgerandi. Tá hittast partarnir nevniliga á Giljanesi, og so fer tað at vísa seg, hvørt taparin av hesum dystinum noyðist eina deild niður til komandi kappingarár.

Í øllum førum tykist víst, at talan í bæði grund- og endaspælið verður um nakrar intensar uppgerðir, sum vónandi kunnu fáa liðini at gera sítt ítarsta hvørja einastu ferð.

**SUNSET KAPPINGIN KVINNUR**

**Dystarskráin**
**FM-bólkur**

| | |
|---|---|
| 08.01 | Neistin-Stjørnan |
| 08.01 | VB-Kyndil |
| 15.01 | Kyndil-Neistin |
| 15.01 | Stjørnan-VB |
| 21.01 | Stjørnan-Kyndil |
| 22.01 | Neistin-VB |
| 05.02 | Kyndil-Stjørnan |
| 05.02 | VB-Neistin |
| 18.02 | Stjørnan-Neistin |
| 19.02 | Kyndil-VB |
| 26.02 | Neistin-Kyndil |
| 26.02 | VB-Stjørnan |

**Niðari bólkurin**

| | |
|---|---|
| 07.01 | Tjaldur-VÍF |
| 08.01 | StÍF-Søljan |
| 15.01 | Søljan-Tjaldur |
| 15.01 | VÍF-StÍF |
| 22.01 | Søljan-VÍF |
| 22.01 | StÍF-Tjaldur |
| 05.02 | StÍF-VÍF |
| 08.02 | Tjaldur-Søljan |
| 18.02 | Tjaldur-StÍF |
| 19.02 | VÍF-Søljan |
| 22.02 | Søljan-StÍF |
| 25.02 | VÍF-Tjaldur |

# Hevur Chelsea ein álopstrupulleika

**Chelsea framherjin Hernan Crespo og miðvallarin Michael Essien vórðu skaddir í dystinum ímóti Westham í gjár, serliga í álopinum kann hetta gerast ein trupulleiki hjá Chelsea**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í dystinum ímóti West Ham í dag, varð argentinski framherjin hjá Chelsea Hernan Crespo skiftur út við einum skaða, tá 8 minuttir vóru eftir av dystinum.

Crespo varð skiftur inn í 59 minutti og skeyt eitt minutt eftir málið, ið legði Chelsea framum 1-2. Men 20 minuttir eftir varð hann skiftur út við Shaun Wright-Phillips. Við heimsins besta beinki skuldi eingin trupulleiki verið, um Crespo verður skaddur í eina tíð. Tí Chelsea plagar altíð at hava onkran at seta við. Men hesuferð, kann tað gerast ein trupulleiki, tí hin vanligi framherjin Didier Drogba verður næsta mánaðin í Afrika og spælir í African Nations Cup við landsliðnum hjá Fílabeinsstrondini.

Umframt Drogba hevur Chelsea einans unga Carlton Cole at seta við í álopinum. Hesin Cole hevur einans spælt fáar minuttir hetta kappingarárið, og er ivaleyst ikki í bestu dystarvenjing. Íslendski Eidur Gudjonsen, hevur fyrr verið framherji, men seinasta árið hevur hann heldur spælt á miðvøllinum, hann er tó ein møguleiki.

Enn er einki komið út alment um skaðan hjá Crespo. Men tá Chelsea í fjør hevði ein líknandi trupulleika, við Drogba skaddum, Mutu koyrdum fyri rúseitursmisnýtslu og Gudjonsen ivasomum. Segði Chelsea venjarin, José Mourinho, at um hann ongan framherja hevði, kundi hann altíð brúka liðskiparan og miðverjuovastan John Terry sum framherja, tí hann skjýtur so nógv mál.

Spennandi verður at vita hvussu leikur fer. Næsti dystur er í steypakappingini í móti Huddersfield Town leygardagin. Hesin dystur átti at verið ein avgreiðslu spurningur, og tað er lítið at ivast í, at Carlton Cole byrjar inni hendan dyst.

Eisini miðvallarin Michael Essien fekk ein skaða í dystinum, talan er um okkurt, ið líkist einum álvarsligum fótliðsskaða. Hetta skrivar onside.dk í morgun. Heimasíðan vil skrivar, at hesin skaði í versta falli, kann verða endin á kappingarárinum hjá Essien, ið hevur verið fastur maður á Chelsea liðnum, síðan hann kom úr Lyon í summar. Essien er ein týdningarmikil spælari, men Chelsea eru rættiliga væl fyri á miðvøllinum, har Gudjonsen ivaleyst er besta boð uppá ein avloysara, hetta er sjálvandi enn ein trupulleiki fyri álopið.

Essien skuldi annars spæla fyri Ghana í African Nations Cup henda mánaðin. Men hetta verður nú væntandi av ongum. Hvussu umfatandi skaðin er verður væntandi greitt í dag. Hetta kann í ringasta falli, gera at Essien ikki fær spælt fyri Ghana í HM. Um so er, er hetta ein ómetaligur missur hjá liðinum, ið ongantíð fyrr hevur spælt seg í eitt HM-endaspæl.

# Innan-dura-DM

Sunnudagin verður farið í holt við sonevndu Tele2-Cup, sum er at rokna sum danska meistaraheitið í innandura fótbólti.

Her verður eitt av liðunum sjálvandi AaB, har leikarahópurin nú telur tveir føroyskar landsliðsspælarar.

Hvørt Jón Rói Jacobsen og Súni Olsen verða partur av hópinum, sum fer í Brøndby høllina at spæla, er tó ikki greitt, men tað er lítið at ivast í, at tað vildi verið kærkomið hjá Jón Róa, um hann við hesum varð slúsaður inn í spælarahópin sum skjótast.

Tað er greitt, hvussu bólkarnir í kappingini verða samansettir. Saman við AaB eru FCK, Viborg og Køge í bólki C. Og so er spurningurin, hvørt AaB verður eitt av liðunum, sum megnar at spæla seg fram til fjórðingsfinalurnar.

**-mørk**

---

# Chelsea setti nýtt met

Við teimum fýra sigrunum í strævnu dystarskránni kring høgtíðina, hevur Chelsea sett nýtt enskt met.

Teir fýra sigrarnir bera nevnliga við sær, at Chelsea hevur 58 stig eftir fyrstu 21 dystirnar, og hetta er tað mesta, sum nakað enskt felag hevur vunnið sær eftir somikið stuttari tíð.

Metið higartil setti Tottenham annars afturi í 1960, tá teir (umroknað til 3-stigaskipan) vunnu sær 56 stig fyrstu 21 dystirnar.

Top-10 listin fyri fyrstu 21 dystirnar sær annars soleiðis út í Onglandi.

| Felag | ár | stig |
|---|---|---|
| Chelsea | 2005/06 | 58 |
| Tottenham | 1960/61 | 56 |
| Preston NE | 1888/89 | 55 |
| Manchester Utd. | 1907/08 | 53 |
| Liverpool | 1987/88 | 53 |
| Sunderland | 1892/93 | 52 |
| Manchester Utd. | 1993/94 | 52 |
| Chelsea | 2004/05 | 52 |
| Sunderland | 1891/92 | 51 |
| Everton | 1969/70 | 51 |
| Leeds Utd. | 1973/74 | 51 |

**-mørk**